# Georg nú í sjónvarpinum

**Í gjár byrjaði tíðindamaðurin Georg L. Petersen í nýggjum starvi á tíðindadeildini í sjónvarpinum. Georg hevur seinnu mongu árini annars starvast á Dimmalætting, og hann er eisini ein av eigarunum av blaðnum**

STARVSSETAN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Sjónvarpsheimurin er tó ikki heilt fremmandur fyri Georg, tí tá ið hann gekk á journalistskúla í Danmark, var hann eitt skifti í starvsvenjing í Sjónvarpi Føroya.

### Vil royna okkurt nýtt

Spurdur, hvussu tað ber til, at hann hevur valt at fara av Dimmu oman í sjónvarpi, sigur Georg L. Petersen:

– Eg vildi fegin royna okkurt nýtt, um møguleiki var fyri tí. Eg haldi eisini, at tað er umráðandi, at man heldur seg koyrandi og ikki læsur seg fastan í einum starvi, sigur Georg L. Petersen.

Sum áðurnevnt hevur Georg áður havt sína dagligu gongd í sjónvarpinum, og tá ið hann lærdi til tíðindamann, skrivaði hann eisini høvuðsuppgávu í sjónvarpsmiðlinum. Georg greiðir eisini frá, at seinasta semestrið hjá honum á skúlanum var um sjónvarp, og at hann altíð hevur havt stóran áhuga fyri hesum miðli.

At Georg nú er farin at starvast í einum loftmiðli, merkir tó ikki, at hann hevur vent blaðheiminum bakið:

– Hetta er framvegis í sama yrki, og eg havi avgjørt ikki sagt blaðheiminum farvæl. Tað var eisini í fullari sátt og semju, at eg fór av Dimmu, og eg havi smekkað nakra hurða aftan fyri meg, sigur Georg L. Petersen, sum væntandi fyrstu ferð verður at síggja á skíggjanum í Degi og Viku sendingini í kvøld.



*Georg L. Petersen, tíðindamaður, byrjaði í gjár í nýggjum starvi í sjónvarpinum, eftir at hann seinnu mongu árini hevur starvast á Dimmalætting, har hann eisini er ein av eigarunum*

# Skeið fyri systkin hjá menningartarnaðum

**Leygardagin hevur skeið fyri systkin hjá menningartarnaðum. Sagt verður, at tað er stórur tørvur hjá systkinum at hitta onnur børn, sum eru í somu støðu sum tey**

SKEIÐ
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tað verða tey bæði Terji Kollsker, sálarfrøðingur og Angela Petersen, sum er námsfrøðingur og hevur eina vaksna menningartarnaða systir, ið skipa fyri skeiðinum.

### Hava góðar royndir

Fía Petersen, ið er ein av stigtakarunum til skeiðið, sigur, at hetta er ikki fyrstu ferð, at Javni skipar fyri einum slíkum skeiði.

– Vit hava roynt tað nakrar ferðir áður, og tað hevur verið við góðum úrsliti. Seinastu ferð, at vit høvdu eitt slíkt skeið, var í 2002, og tað eydnaðist avbera væl. Millum annað tóku nøkur av børnunum stig til sjálvi at gera ein leik um eina familju við einum menningartarnaðum barni, og tann leikur lýsti ógvuliga væl nakrar av teimum trupulleikum, ið stinga seg upp í eini slíkari familju, og tá kom nógv fram. Tað skeiðið var tóætlað eitt sindur eldri børnum, enn skeiðið komandi leygardag er, greiðir Fía Petersen frá.

At vaksa upp sum systkin hjá einum menningartarnaðum barni, er ikki altíð líka lætt, og Fía Petersen sigur, at børnini eisini skulu liva við, at teirra familja er eitt sindur øðrvísi enn aðrar familjur.

– Tað menningartarnaða barnið fyllir nógv í gerandisdegnum hjá familjuni, alt eftir hvussu stórt brek tað hevur. Av somu orsøk blíva systkini eisini meira tolerant og helst eisini sjálvbjargin, sum sjálvsagt er gott. Hinvegin kann tað eisini hava við sær, at børnini ikki vilja út við nøkrum kenslum, sum tey kanska halda ikki eru loyvdar, og tað kann verða óheppið, siga tey í Javna.

### Bæði prát og handaligt

Skeiðið, sum verður í hølunum hjá Javna leygardagin, verður skipað á tann hátt, at teir 23 luttakararnir, ið higartil hava teknað seg til skeiðið, partvís arbeiða saman og partvís í tveimum bólkum.

– Teir báðir skeiðsleiðararnir fara at tosa við børnini í felag, men tey fara eisini at býta børnini upp í tvey. Tá fer Terji Kollsker at tosa við børnini meiri út frá einum sálarligum sjónarmiði, meðan Angela Petersen fer at gera okkurt meiri handaligt við teimum. Nú veit eg ikki nágreiniliga, hvussu hetta verður gjørt hesaferð, men seinast var tað nakað við, at børnini málaðu nakrar kenslur, ið tey høvdu, greiðir Fía Petersen frá.

Hon heldur, at tað er sera stórur tørvur á slíkum skeiðum, og luttakaratalið á skeiðnum skuldi verið eitt gott prógv um tað.




*Tað hevur víst, at tað er stórur tørvur á skeiðum fyri systkum hjá menningartarnaðum, og tí skipar Javni fyri einum slíkum komandi leygardag.*

*savnsmynd*

# Høgni hóttir James Blunt

**James Blunt liggur aftur hesa vikuna ovast á 15 teimum bestu, men vinnarin av planetini fyri bestu fløgu Høgni Lisberg er um at koppa fyrrverandi NATO-hermanninum.**

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Høgni Lisberg og lagið, Learn To Ride On Waves, hava seinastu vikurnar klatra stig fyri stig upp eftir 15 teimum bestu. Lagið hjá unga leirvíkinginum er hesa vikuna komið upp á annað pláss, beint í hølunum á Goodbye My Love hjá James Blunt.

Learn To Ride On Waves, ið er tikið av bestu fløguni í 2005, Morning Dew, er higartil største hittið hjá Høgna, og hevur uttan iva verið ein av orsøkunum til, at heilt nógv sms atkvøddu Morning Dew, sum bestu fløgu á Planet Awards.

Í seinastu sending kom danskt/føroyski bólkurin Fuzzphase inn á fimta pláss, men hetta tykist mest at hava verið eitt upplop, tí hesa vikuna er bólkurin dottin ikki færri enn seks pláss niður á ellinta pláss.

Samstundis roynir enn eina útiseta bólkur seg við einum eykalag, talan er um Amazonair við føroyska gittarleikaranum Pæturi Sivertsen. Lagið hjá bólkinum Because Tonight, fekk sera góða umrøðu, tá bólkurin í fjør luttók í donsku tónleikakappingini Live Contest.

Poppkorn hava ikki longur lagið, Sjeikurin, á listanum tí tað er fallið fyri tíðarfreistini, í staðin er hesa vikuna lagið "Droymi mitt um dagin" komið inn, lagið kom beint inn á tíggjunda pláss.

Hini føroysku løgini á listanum er Grannin hjá Páll Finnur Páll á sætta plássi og Timburmenn hjá Peturi Pólsyni, ið er á fjúrtanda plássi.